# Klaksvíkar Býráð

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 30.04.2026 kl. 17:30 |
| **Málnr.:** | 24/01278 Gerðabók |
| Nevndarlimir: | Karl H. Johansen, Annika S. Biskopstø, Signhild V. Johannesen, Hermann R. Samuelsen, Anfinn í Toft, Sylvia Thomsen, Jógvan Skorheim, Oddmar á Lakjuni, Eyðstein Ó. Poulsen, Fríðin Ziskason og Atli S. Justinussen |
| Varalimir: | Hjalmar Zachariassen møtti fyri Sylviu Thomsen |
| Ikki møtt: | |
| Onnur: | Sonni Ó. Djurhuus, kommunustjóri |
| Protokollførari: | Jensa Anthoniussen, journalfulltrúi |

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 27/26 | 26/00008-8 | Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Sylvia |
| 28/26 | 26/00482-1 | Útbygging, ítróttarøkið 1. byggistig |
| 29/26 | 23/00248-39 | Leiguøki, matr.nr. 1186 - umskipan av øki |
| 30/26 | 21/01331-129 | Ídnaðarøkið undir Hamri – Neyðug vegabroyting |
| 31/26 | 21/01340-157 | Vegir til eldri sethúsaøkir - kunning |
| 32/26 | 26/00013-4 | Vegir - íløgur í 2026 – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 33/26 | 26/00022-34 | Serflutningsskipanin – víðari skipan 2026 og frameftir |
| 34/26 | 26/00490-2 | Matr.nr. 746x á almenna sølulista kommununnar |
| 35/26 | 26/00468-2 | Umsókn um marknaumskipan við Kommunubrekkuna |
| 36/26 | 26/00504-1 | Sprotin, nýtt rakstrarstað - útreiðsluneutral flyting millum kontur – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 37/26 | 25/01433-33 | Integratiónssamskipari - *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 38/26 | 26/00285-1 | Húsið 20 ár – játtan til frukt og grønt - *flyting frá íløgu til rakstur, seinna viðgerð* |
| 39/26 | 25/01389-6 | Reguleringar í samband við játtaðan rakstur 2026 - *flyting millum kontur, seinna viðgerð* |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 40/26 | 24/01013-23 | Innafturtøka ella loyvi til víðarisølu |
| 41/26 | 26/00308-8 | Heimaundirvísing av fólkaskúlanæmingum – skipað kommunalt eftirlit |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Til viðgerðar**

## 27/26
## 26/00008-8 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Sylvia Thomsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 27/26 |

## 26/00008-8 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Sylvia Thomsen

**Frágreiðing um málið:**
Sylvia Thomsen, býráðslimur hevur boðað frá, at hon hevur forfall til býráðsfundin 30. apríl 2026.
Næstvaldur á valevnislistanum er Hjalmar Zachariassen.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, §18. stk. 1.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til innkalling av tiltakslimi fyri Sylviu Thomsen.

**Klaksvíkar Býráð 30. april 2026:**
Einmælt samtykt at lata Hjalmar Zachariassen taka sæti á fundinum fyri Sylviu Thomsen.

## 28/26
## 26/00482-1 Útbygging, ítróttarøkið 1. byggistig

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 21.04.2026 | 22/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.04.2026 | 38/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 28/26 |

### 26/00482-1 Útbygging, ítróttarøkið 1. byggistig

**Frágreiðing um málið:**
Hondbóltsfeløgini í Klaksvík hava víst á átrokandi tørv at fáa nýggj og fleiri umklæðingarhølir til KÍ høllina, sum í dag ikki lýkur krøvini til dystarvirksemi í vikuskiftinum.
Tískil hevur arbeitt verið við einari endurskoðaðari heildarætlan fyri ítróttarøkið, har umklæðingarhølir, hølir til styrkivenjing, fimleikahøll og nýggjari svimjihøll.
Í dag er ongin fimleikahøll í Klaksvík, og svimjihøllin er undir stórum trýsti at lúka dagsins krøv. Nýggja uppskotið inniheldur loysnir til hesar avbjóðingar, og verður uppskotið tí lagt fyri avvarðandi nevndir til viðgerðar.
Ítøkiliga skal støða takast til, um 1. byggistig skal setast í verk nú, soleiðis at hetta kann verða liðugt til oyggjaleikirnar, sum verða komandi ár. Ítróttarhallirnar skulu hýsa flogbóltskappingini á oyggjaleikunum, umframt at ein súkklukapping eisini verður í Klaksvík, sum koma at brúka umklæðingarhølini í hallunum.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Heildaruppskotið leggur upp til at gera eina samanbygging millum Badmintonhøllina og KÍ høllina, sum inniheldur umklæðingardeildir, hølir til styrkivenjing og eitt fimleikagólv, umframt felagsvesir til alt økið.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Dagføringar á ítróttarøkinum eru í tráð við ST Heimsmál 3 (Góð heilsa og trivnaður) og Heimsmál 4 (Góð útbúgving).
Samstundis stuðla tær undir Heimsmál 10 (Minkaður ójavni) við at tryggja atgongd og javnbjóðis møguleikar fyri allar borgarar.
Verkætlanin er eisini í samsvari við Heimsmál 11 (Burðardyggir býir og bygdir).
Við burðardyggum loysnunum verður harumframt stuðlað undir Heimsmál 12 og 17.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Innleiðandi metingin uppá 1. byggistig er uppá knappar 52 mió., sum kunnu deilast uppá 25 mió í ár og 25 í 2027, fyri at fremja 1. byggistig.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at seta 1. byggistig í verk og at eykajátta 26 mió í 2026 við lántøku, og ísv. fíggjarætlanararbeiði til 2027 seta aðrar 26 mió av til endamálið.

**Mentanarnevndin 21. apríl 2026:**
Ein meiriluti, SVJ, ASB og HRS, tekur undir við tilmælinum, vísandi til verkætlanina, sum verður fíggjað við lántøku áljóðandi 7.178.445 kr.
Ein minniluti, ASJ og EYÓP, tekur undir við at seta 1. byggistig í verk, treytað av, at tað ikki er bundið at byggistig 2 og 3, og at fíggingin verður funnin innan verandi fíggjarætlan.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2026:**
Ein meiriluti, KHJ, AíT og SVJ, mælir til at kanna kostnaðin á byggistigi 1, har einans niðasta hæddin verður innrættað, og at kanna kostnaðin av at byggja byggistig 2 sum 1. byggistig.
OáL og JS taka støðu í býráðnum.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá býráðsminnilutanum: "*Mælt verður til, at fimleikarhøllin verður raðfest fyrst, og at hølir til Oyggjaleikir verður at kanna nærri.*"; tað fall við 5 atkvøðum fyri (JS, OáL, EÓP, FZ og ASJ) og 6 atkvøðum ímóti (KHJ, ASB, SVJ, HRS, AíT og HZ).

Atkvøtt varð síðani um meirilutatilmælið í FíN 28-04-2026; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, ASB, SVJ, HRS, AíT, HZ og FZ), ongari atkvøðu ímóti, og 4 blonkum atkvøðum (JS, OáL, EÓP og ASJ).

**29/26**
**23/00248-39 Leiguøki, matr.nr. 1186 - umskipan av øki**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 21.04.2026 | 16/26 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 22.04.2026 | 27/26 |
| 3 Tekniska Nevnd | 22.04.2026 | 37/26 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.04.2026 | 37/26 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 29/26 |

**23/00248-39 Leiguøki, matr.nr. 1186 - umskipan av øki**

**Frágreiðing um málið:**
Ísv. at fyritøka fekk loyvi til at leiga matr.nr. 1186 til at byggja skrivstovu- og goymslubygning á, eru hendar nakrar broytingar við ætlanunum á økjunum, at málið verður lagt fyri avvarðandi nevndir til støðutakan.
Onnur fyritøka hevur keypt bygningin, har Toll og Skatt fyrr helt til, til egna umsiting og vil í tí sambandi fegin gera sær eitt øki sunnanfyri bygningin til parkering hjá starvsfólkum. Fyri at hetta skal verða gjørligt, er tískil neyðugt at flyta leiguøkið, sum fyrrnevnda fyritøka hevur fingið lovað, longur suður. Ísv. at stykkið verður flutt longur suður, verður neyðugt við nakað av útgrevstri. Hesin útgrevstur verður mettur til at vera uml. 180 fermetrar, sum er mett til at kosta 400 – 500.000 kr. at fremja. Hetta verður lagt fyri partarnar.
Tílík bygging, sum ætlan er at gera, kemur eisini at hava nakað av ávirkan á ferðsluviðurskiftini í økinum, og tískil verður málið lagt fyri ferðslunevndina til umrøðu.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Útleiga av kommunalum vinnuøkjum stuðlar undir ST Heimsmál 8 og 9 við at skapa karmar fyri vinnuligum vøkstri, arbeiðsplássum og nýskapan.
Samstundis verður stuðlað undir Heimsmál 11 við eini skipaðari og burðardyggari býarmenning.
Gjøgnum skilagóða landnýtslu og krøv til vinnuøki verður eisini stuðlað undir Heimsmál 12 og 17.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tað eru knýttar 400-500.000 kr. at evt. útgrevstri, sum skal takast upp við partarnar.
Annars er talan um umleið 620 fermetrar, sum kann leigast út sum grúslendi, og gevur hetta 14.600,- árliga í inntøku.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndirnar taka støðu til:

1. Ferðsluviðurskiftini ísv. bygging
2. Loyva byggiverkætlan longur suður ímóti Kl. Hermetikk

**Ferðslunevndin 21. apríl 2026:**
Viðv. pkt. 1: Nevndin mælir til, at parkeringin verður skipað soleiðis, at bilar venda rætt, tá farið verður út á Stangavegin.
Viðv. pkt. 2: verið til kunningar.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Havna- og Vinnunevndin 22. apríl 2026**
Vísandi til áður gjørdar samtyktir á økinum, mælir nevndin til, at umsitingin fer í samráðingar við Kanjon, um at Kanjon fær yvirhæddina, og Klaksvíkar Havn fær veghæddina.

**Tekniska Nevnd 22. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við HaVN 22-04-2026.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við HaVN 22-04-2026 og mælir til, at fyrri umsøkjarin ikki fær eyka útreiðslur av broytingini.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Málið tikið av skrá.

## 30/26
## 21/01331-129 Ídnaðarøkið undir Hamri – Neyðug vegabroyting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 22.04.2026 | 31/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.04.2026 | 41/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 30/26 |

**21/01331-129 Ídnaðarøkið undir Hamri – Neyðug vegabroyting**

**Frágreiðing um málið:**
Tá verkætlanin "Ídnaðarøkið undir Hamri" varð framd, kravdi hetta, at vegurin frammanfyri ætlaða virkisbygningin LookNorth skuldi regulerast í hædd fyri at hóska til byggingina, sum verður framd við tveimum planeringshæddum.

Avtala er gjørd við LookNorth, at ein lítil brekka á vegnum skal liggja á ávísum stað framman fyri nýggja virkisbygningin, har út- og innkoyring verður við treylarum. Stykkið hjá LookNorth er trappað ein metur ella hevur tvær planeringshæddir.

Annað byggimál *(byggingin hjá Norðhús)* í økinum kravdi størri byggiøki, og tí var avgjørt at flyta stykkið hjá LookNorth 10 metrar longur suður. Istallasjónir og brekkan hjá LookNorth er ikki flutt við nýggju staðsetingini. Neyðugt verður tí at flyta brekkuna og at gera nýggjar installasjónir til stykkið hjá LookNorth.
Mettur kostnaður av at broyta vegin (brekkuna) er 700 tkr. Afturat hesum er neyðugt at leggja eina nýggja stóra regnvatnsleiðing ø500 frá berginum undir bygningin hjá LookNorth og víðari gjøgnum verjugarðin og út á sjógv. Nevnda leiðing og spillivatnsleiðing v.m. er mett at kosta 200 tkr.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Víst verður til Heimsmál nr. 9, sum umfatar vinnu, nýskapan, undirstøðukervi, sum Klaksvíkar Býráð og Føroya Landsstýri taka undir við. At fremja undirstøðukervi í einum samfelag, har tørvur er, hevur stóran týdning, og stuðla hesi átøk/verkætlanir eisini undir heimsmál fyri burðardyggari menning, mál nr. 11, at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin + aðrar viðkomandi reglur fyri vegir, sum Klaksvíkar Býráð hevur samtykt.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
- Eingin peningur er tøkur til býggibúning av ídnaðarøkjum í 2026.
- Ein møgulig avleiðingin í 2026 er, at leiðingsarbeiðið má fremjast fyri ein mettan kostnað uppá 200 tkr.
- Restin – 700 tkr. - kann bíða til í 2027, sambært LookNorth.
- Havnin Íløgur hevur eina játtan uppá 6,55 mió. kr., sum er bundin til aðrar íløgur.
- Samlaður kostnaður er sambært meting omanfyri – 900 tkr.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at fyrisitingin fær heimild til at samráðast við LookNorth um arbeiðið, har ein tíðarætlan verður gjørd, soleiðis at kommunala arbeiðið verður framt og goldið í 2027. Sambært hesum skal býráðið binda seg til at seta 900 tkr. av til byggibúning Ídnaðarøkir í 2027.

**Havna- og Vinnunevndin 22. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-04-2026

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við HaVN 22-04-2026.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 28-04-2026 einmælt samtykt.

## 31/26
## 21/01340-157 Vegir til eldri sethúsaøkir - kunning

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.04.2026 | 48/26 |
| 2 Tekniska Nevnd | 22.04.2026 | 34/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 31/26 |

**21/01340-157 Vegir til eldri sethúsaøkir - kunning**

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini dagf. 11-04-2026.

**Burðardygd og heimsmálini:**
At fremja útstykkingar (gongubreytir, gongugeilar, koyrivegir, parkeringspláss o.a.) í einum samfelag, har tørvur er, hevur stóran týdning, og stuðla hesi átøk/verkætlanir væl undir heimsmál fyri burðardyggari menning, t.d. mál nr. 11, at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin pluss aðrar vegareglur, sum Klaksvíkar Býráð hevur gjørt galdandi í Klaksvíkar kommunu.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Málið skal ikki hava tilætlaðar avleiðingar fyri fíggjarætlanina fyri 2026. Raðfestu málini ætlast avgreidd innan avsetingina til *Vegir Íløgur* og innan avseting til *Byggibúning Bústaðir* í 2026. Fyrisitingin hevur sum málsetning, at fremja raðfestu arbeiðini innan fyri játtanina.

**Tilmæli:**
Við hesum verður kunnað um málið "Vegir til eldri sethúsaøkir". Málið er sent nevndunum til viðgerðar, fyri at geva nevndunum møguleika fyri, um gjørligt, at geva eina ábending um, nær hildið verður fram við næsta arbeiðinum. Borgara ynskja, at viðkomandi nevndir verða kunnaðar um, at spurt verður eftir málinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2026:**
Ein meiriluti, AíT, ASB og ST, mælir til, at tað áhaldandi verður arbeitt fram ímóti at fáa vegir til eldri sethúsaøkir, til onnur samtykt fyriliggur.
Ein minniluti, JS og EÓP mælir til, at ferð verður sett á at fáa vegir til eldri sethúsaøkir.

**Tekniska Nevnd 22. apríl 2026:**
Ein meiriluti, HRS, AíT og ST, tekur undir við meirilutanum í UBN 20-04-2026.
Ein minniluti, OáL og ASJ, tekur undir við minnilutanum í UBN 20-04-2026.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið í TN 22-04-2026; JS, OáL, EÓP, FZ og ASJ atkvøddu fyri; KHJ, ASB, SVJ, HRS og AíT atkvøddu ímóti. HZ atkvøddi ikki. Sostatt er minnilutatilmælið fallið.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið í TN 22-04-2026; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (KHJ, ASB, SVJ, HRS, AíT og HZ), ongari atkvøðu ímóti og 5 blonkum atkvøðum (JS, OáL, EÓP, FZ og ASJ). Sostatt er meirilutatilmælið samtykt.

## 32/26
## 26/00013-4 Vegir - íløgur í 2026 - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 22.04.2026 | 35/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.04.2026 | 42/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 32/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | |

**26/00013-4 Vegir - íløgur í 2026**

**Frágreiðing um málið:**
Játtan í 2026 til Íløguarbeiðir vegir: kr. 5.250.000,-
Raðfest arbeiðir: kr. 3.250.000,-
Eftir at raðfesta: kr. 2.000.000,-

**Burðardygd og heimsmálini:**
At fremja gongubreytir, gongugeilar, koyrivegir og parkeringspláss í einum samfelag, har tørvur er, hevur stóran týdning, og stuðla hesi átøk/verkætlanir væl undir heimsmál fyri burðardyggari menning, t.d. mál nr. 11, at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin og aðrar vegareglur, sum Klaksvíkar Býráð hevur gjørt galdandi fyri kommununa, m.a. við samtyktu byggisamtyktini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Óbrúkti peningurin til parkeringsplássið í Árnafirði kemur illa við hjá Tekniska økinum (2025), tí í roknistykkinum omanfyri er sett av av nýggjum. Ein framflyting av óbrúktari játtan hevði komið sera væl við, og tí verður málið sent Fíggjarnevndini og Býráðnum til viðgerðar, tá talan kann gerast um eina framflyting av játtan.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið sent nevndini til umrøðu/støðutakan. Tekniska Fyrisiting viðmælir:

- At 900 tkr. av óbrúktari játtan í 2025 til parkeringspláss og hús í Árnafirði verður framflutt til fíggjarætlanina fyri 2026. Málið krevur tvær býráðsviðgerðir.
- At restupphæddin 2,0 mió. kr. (ella 2,9 mió. kr. við framflyting) verða býttar millum ætlaða arbeiðið í Biskupsstøðgøtu og Nólsoyar Pálsgøtu.

**Tekniska Nevnd 22. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-04-2026.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við TN 22-04-2026, og staðfestir, at talan er um eykajáttan.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 28-04-2026 einmælt samtykt. Eykajáttanin verður at fíggja av *tøkum peningi.*

## 33/26
## 26/00022-34 Serflutningsskipanin – víðari skipan 2026 og frameftir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 21.04.2026 | 15/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.04.2026 | 43/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 33/26 |

**26/00022-34 Serflutningsskipanin – víðari skipan 2026 og frameftir**

**Frágreiðing um málið:**
Vísandi til samtykt hjá TrN E&B, verður mælt til, at nýggjur serflutningsbussur, sum ikki krevur stóra koyrikortið, verður keyptur fyrst í 2027, tvs. hetta keypið skal takast við í fíggjarætlanina fyri komandi ár (2027). Sí eisini skriv frá umsitingini dagf. 10-04-2026.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir nakra útreiðslu, uttan at játtan til hesa fyriliggur.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tær í hesum tilmæli umrøddu útreiðslur í 2026 verða fíggjaðar við søluni av verandi serflutningsbussi.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Kostnaðurin av nýggjum bussi, sum ætlanin er at keypa í 2027, er um 600.000 kr.
Sostatt krevur hetta ætlaða busskeypið eina íløguavseting í fíggjarætlanini fyri 2027 á umleið 600.000 kr.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfesta skjal, verða nevndir og býráð kunnað um status í málinum, samstundis sum biðið verður um tilsøgn til, at umleið 600.000 kr. verða settar av í komandi fíggjarætlan fyri 2027 til íløgur í nýggjan serflutningsbuss, sum verður keyptur fyrst í 2027.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 21. apríl 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 10.04.2026.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við E&B 21-04-2026.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 28-04-2026 einmælt samtykt.

## 34/26
## 26/00490-2 Matr.nr. 746x á almenna sølulista kommununnar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.04.2026 | 50/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.04.2026 | 40/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 34/26 |

**26/00490-2 Matr.nr. 746x á almenna sølulista kommununnar**

**Frágreiðing um málið:**
Vísandi til býráðssamtykt 30.05.2024 pkt. *d. Mælt verður til at seta matr.nr. 746x á almenna sølulistan hjá kommununi.*
Grundstykkið bleiv ikki sett á sølulistan, tí neyðugt var at gera eitt avvatningsarbeiði omanfyri og á grundstykkinum/markinum. Arbeiðið er nú gjørt, og tí kann grundstykkið setast til sølu.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.
Reglugerð fyri talgildari sølu av grundstykkjum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Søluprísur kr. 355.000,-

**Tilmæli:**
Mælt verður til at seta grundstykkið til sølu, tá sølulistin næstu ferð verður dagførdur

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá Teknisku Fyrisiting dagf. 13-04-2026.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við UBN 20-04-2026.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 28-04-2026 einmælt samtykt.

## 35/26
## 26/00468-2 Umsókn um marknaumskipan við Kommunubrekkuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.04.2026 | 52/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 35/26 |

## 26/00468-2 Umsókn um marknaumskipan við Kommunubrekkuna

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til umbýti millum matr.nr. 340a og 342 í Klaksvík. Talan er um grannaognir við Kommunubrekkuna, har størra ognin letur uml. 54 $m^2$ til ta minnu.

Tekniska Fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til málið:
Ognar- og byggisamtyktarlig viðurskifti:

- matr.nr. 342: – vídd 112 $m^2$ – økispartur: A5 (blandað íbúðar- og vinnuendamál)
- matr.nr. 340a: – vídd 232 $m^2$ – økispartur A5 (blandað íbúðar- og vinnuendamál)

Sami eigari er til báðar matriklar.

Galdandi fyri verandi støður hjá báðum matriklum er sostatt, at víddin er minni enn ásett í Almennu Byggisamtyktini, har minsta vídd grundøki fyri støk hús er 300 $m^2$. – Við umskipanini verður víddin av matr.nr. 342 uml. 166 $m^2$, meðan matr.nr. 340a verður uml. 178 $m^2$.

Tað serliga í málinum er, at á matr.nr. 340a stendur eitt dupult bilhús, har innari helmingurin stendur á triðju ognini (matr.nr. 341), sum ikki er partur í aktuellu umskipanini. – *(Sambært skjølum í máli frá 1974 var byggingin av bilhúsinum tá framd sum felagsbygging hjá eigarnum av matr.nr. 340a og 341. Onki sæst tó vera tinglýst og ógreiða er á veruligu eigaraviðurskiftunum og ræðisrættindum á bilhúsi og atkomurætti í dag).*

Nú aðrir eigarar eru skrásettir til undirlendið undir bilhúsinum, og fyriliggjandi umsókn snýr seg um, at flyta markið millum matr.nr. 342 og 340a til mitt í gjøgnum sunnara helvt av bilhúsimum, saknar umsitingin úttalilsi frá eigaran av matr.nr. 341, sum eigur lendið undir norðara parti av bilhúsinum.
Í byggimálium frá 1974 sæst málið ongantíð vera endaliga avgreitt – hvørki tá tað kemur til byggiloyvi, matrikulering ella tinglýsing av atkomurætti.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi

**Tilmæli:**
Vísandi til málslýsingina frammanfyri krevur viðmæli kommununnar frávik frá minsta krav grundøkjavídd.
Grundað á, at báðar umsøkjandi ognirnar (matr.nr. 340a og 342) longu frammanundan eru niðanfyri ásetta minstamark, verður mælt til

- at viðmæla frávik frá kravinum um minstu vídd grundøki, men
- at eigarin av lendinum undir norðara parti av bilhúsinum (matr.nr. 341) eisini verður tikin við/váttar umskipanarætlanina.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmæli frá TF dagf. 13-04-2026.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Tilmælið frá Umhvørvis- og Býarskipanarnevndini 20-04-2026 einmælt samtykt.

## 36/26
## 26/00504-1 Sprotin, nýtt rakstrarstað - útreiðsluneutral flyting millum kontur - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.04.2026 | 34/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 36/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | |

**26/00504-1 Sprotin, nýtt rakstrarstað - útreiðsluneutral flyting millum kontur (eykajáttan 2026)**

**Frágreiðing um málið:**
Føroya Gjaldstova hevur boðað frá, at kommunurnar skulu stovna nýtt rakstrarstað/undirkontu til orðabókina Sprotin við gildiskomu 1. januar 2026.
Kommunur vístu á, at tað er óheppið at koma við broytingum, eftir at fíggjarætlanin fyri 2026 er samtykt. Avgerðin hjá FGJ stendur við og allar kommunur fylgja avgerðini. Tí verður fíggjarætlan og kontuplanur at tillagast samsvarandi hesum.
Vit hava undanfarin bókað Sprotan (áleið kr. 140.000) undir Skúlatrøð, og tað er eisini har, játtanin liggur. Tí verður henda fíggjarbroyting at gera.

Broytingin er útreiðsluneutral – hevur ongar fíggjarliga avleiðingar fyri kommununa.

Flestu rakstrarstøðini undir § 5 hoyra undir mentanarnevndina, og tí er verður mælt til, at hon kemur at umsita nýggja rakstrarstaðið.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.tíl frá 5. okt 2008.
Lógarheimildin er í § 47 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin)

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Broytingin er útreiðsluneutral – hevur ongar fíggjarliga avleiðingar fyri kommununa.

**Tilmæli:**
Vísandi til avgerðina hjá Føroya Gjaldstovu og kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.tíl frá 5. okt 2008 verður mælt til, at kommunan tekur undir við, at orðabókin Sprotin frá 1. januar 2026 verður staðsett undir § 5.
Mælt verður eisini til, at rakstrarstaðið verður lagt undir Mentanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2026:**
Tilmælið, dagf. 21-04-2026, einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 28-04-2026 einmælt samtykt.

## 37/26
## 25/01433-33 Integratiónssamskipari - *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 17.03.2026 | 12/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.04.2026 | 28/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 09.04.2026 | 23/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 37/26 |

**25/01433-33 Integratiónssamskipari**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 9. apríl 2026.

**Lógargrundarlag:**
*Integratiónslógin* áleggur kommununi at seta ein integratiónssamskipara.

*Kommunustýrislógin* áleggur kommununi at útvega neyðuga játtan til nýggjar útreiðslur, áðrenn farið verður undir hesar.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| | Pr. mð. | 2026 | Heilárliga |
|---|---|---|---|
| Mettar lønarútreiðslur | 55.341 | 442.730 | 683.000 |
| Mettar aðrar útreiðslur | 10.000 | 80.000 | 120.000 |
| **Mettar útreiðslur íalt** | | **522.730** | **803.000** |

| | Fólkatal | Lutfall | Býtið 2026 | Býtið heilárliga |
|---|---|---|---|---|
| **Tilsamans** | 10.391 | 100,00 | 522.730 kr. | 803.000 kr. |
| **Eysturkommuna** | 2.283 | 21,97 | 114.849 kr. | 176.427 kr. |
| **Fuglafjarðar kommuna** | 1.638 | 15,76 | 82.401 kr. | 126.582 kr. |
| **Fugloyar kommuna** | 48 | 0,46 | 2.415 kr. | 3.709 kr. |
| **Hvannasunds kommuna** | 426 | 4,10 | 21.430 kr. | 32.921 kr. |
| **Klaksvíkar kommuna** | 5.523 | 53,15 | 277.840 kr. | 426.809 kr. |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Kunoyar kommuna** | 148 | 1,42 | 7.445 kr. | 11.437 kr. |
| **Viðareiðis kommuna** | 325 | 3,13 | 16.349 kr. | 25.115 kr. |

Verandi avseting til integratión í samtyktu fíggjarætlan býráðsins fyri 2026 er 183.000 kr., har fylgjandi føstu útreiðslur frammanundan eru disponeraðar soleiðis:

| | |
|---|---|
| Játtan til integratión 2026, Klaksvíkar kommuna | 183.000 |
| - Føst samsýning til verandi starvsfólk | - 96.000 |
| = Tøk játtan í inniverandi fíggjarári | 87.000 |
| + Tørvandi eykajáttan ella flyting millum kontur | 200.000 |
| = Játtan til integratión, sum tørvur er á í 2026 | 287.000 |

Sostatt er tørvur á – í inniverandi ári (2026) – at býráðið útvegar 200.000 kr. afturat til fígging integratiónssamskiparanum, sum antin kann útvegast sum eykajáttan av tøkum peningi ella við flyting millum kontur, frá játtanini til Ung í Arbeiði (standardkonta "Tiltakspeningur og budgetjavningar").

Fyri játtanina til Ung í Arbeiði, er talan um hesar fíggjarligu avleiðingar, um samtykt verður at taka av játtanini til hesa flyting millum kontur:

| | |
|---|---|
| Samtykt játtan til Ung í Arbeiði 2026 | 500.000 kr. |
| - Tilmæli hetta umfarið um flt.ml.kontur – til bráðfeingis ábøtur í Barnah. Margit | -120.000 kr. |
| - Tilmæli hetta umfarið um flt.ml.kontur – til ljóðtálming vøggustovur í Dr. Margr. Bg. | -120.000 kr. |
| - Hetta tilmælið um flt.ml.kontur – til fígging av nýggja integratiónssamskiparanum | -200.000 kr. |
| **= Restjáttan 2026 hjá Ung í Arbeiði** | **= 60.000 kr.** |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt til, at býráðið útvegar 200.000 kr. afturat til fígging av nýggja, lógarskylduga integratiónssamskiparanum, antin sum eykajáttan av tøkum peningi ella við flyting millum kontur, frá játtanini til Ung í Arbeiði, rakstrarstað nr. 03241270045, standardkonta nr. 741000 "Tiltakspeningur og budgetjavningar".

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 17. mars 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 02.03.2026 og heitir á FíN at staðfesta endaliga fígging.

**Fíggjarnevndin 7. apríl 2026:**
Ein meiriluti, KHJ, AíT og SVJ, mælir til at fíggja eykajáttanina av *tøkum peningi*.
JS og OáL taka støðu í býráðnum.

**Klaksvíkar Býráð 9. apríl 2026:**
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá býráðsminnilutanum: "*Mælt verður til, at tær 6 býráðsnevndirnar, UBN, MeN, B&U, E&B, HaVN og TN, býta upphæddina, kr. 200.000, sínámillum av sínum játtanum*"; tað fall við 5 atkvøðum fyri (JS, OáL, EÓP, FZ og ASJ) og 6 atkvøðum ímóti (KHJ, ASB, HRS, AíT, SVJ og ST).

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá Fíggjarnevndini 7. apríl 2026; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (KHJ, ASB, HRS, AíT, SVJ og ST) og 5 atkvøðum ímóti (JS, OáL, EÓP, FZ og ASJ).

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Atkvøtt varð um tilmælið frá BýR 09-04-2026; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (KHJ, ASB, SVJ, HRS, AíT og HZ), og 5 atkvøðum ímóti (JS, OáL, EÓP, FZ og ASJ); er sostatt samtykt við seinnu viðgerð.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

## 38/26
## 26/00285-1 Húsið 20 ár – játtan til frukt og grønt - *flyting frá íløgu til rakstur, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 17.03.2026 | 14/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.04.2026 | 26/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 09.04.2026 | 24/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 38/26 |

**26/00285-1 Húsið 20 ár – játtan til frukt og grønt**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 9. apríl 2026.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir nakra nýggja útreiðslu, uttan at játtan fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verandi íløgujáttan hjá Húsinum er 400.000 kr.
Mælt verður til, at 30.000 kr. verða fluttar frá omanfyri nevndu íløgujáttan og til raksturin hjá Húsinum eftir niðanfyri útgreinaða leisti:

| Rakstrarnr. | Rakstrarstað | Kontunr. | Kontunavn | Núver. játtan | *Broyting* | Nýggj játtan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3241270140 | Húsið (íløga) | 313100 | Bygningar (privat arb.orka) | 400.000 | *-30.000* | 370.000 |
| 3241270040 | Virkishúsið fyri ung | 143000 | Matur og drykkjuvørur | 60.000 | *30.000* | 90.000 |
| | | | | | *0* | |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt til, at 30.000 kr. verða fluttar frá íløgujáttanini hjá Húsinum til rakstrarjáttanina hjá Húsinum eftir tí í hesum tilmæli útgreinaða leisti.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 17. mars 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 26-02-2026.

**Fíggjarnevndin 7. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við B&U 17-03-2026.

**Klaksvíkar Býráð 9. apríl 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 7. apríl 2026 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 09-04-2026 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 39/26
## 25/01389-6 Reguleringar í samband við játtaðan rakstur 2026 - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 17.03.2026 | 12/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.04.2026 | 25/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 09.04.2026 | 25/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2026 | 39/26 |

**25/01389-6 Reguleringar í samband við játtaðan rakstur 2026**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 9. apríl 2026.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir útreiðslur, ið ikki frammanundan hava eina játtan.
Tað er júst hetta, sum er avbjóðingin við fyriliggjandi játtan til Húsið í 2026 – hon er lægri enn tað, sum krevst fyri at hava Húsið koyrandi á ein nøktandi hátt.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mælt verður til flytingar millum kontur innanhýsis á trivnaðarøkinum, sum netto eru útreiðsluneutralar.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfestu skjøl, verður mælt til, at 480.000 kr. verða fluttar millum kontur frá rakstrarstaðnum "03261170026 Snjallabjalla" – til fylgjandi rakstrarstøð: Kr. 100.000 verða fluttar til rakstrarstaðið "03261170012 Blákollan" og Kr. 380.000 verða fluttar til rakstrarstaðið "03241270040 Virkishúsið fyri ung" sambært tí tí hesum tilmæli og í viðfestu skjølum útgreinaða leisti.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 17. mars 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 26-02-2026.

**Fíggjarnevndin 7. apríl 2026:**
Nevndin tekur undir við B&U 17-03-2026.

**Klaksvíkar Býráð 9. apríl 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 7. apríl 2026 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2026:**
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 09-04-2026 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 40/26
## 24/01013-23 Innafturtøka ella loyvi til víðarisølu

## 41/26
## 26/00308-8 Heimaundirvísing av fólkaskúlanæmingum – skipað kommunalt eftirlit

*Fundurin lokin kl. 22.30*